

## Sethús við garasju

**Dalagøta 15. Matr. nr. 790k,** grundøki 472 $m^2$. Góð sethús í einari hædd við garasju og partvís krúpikjallara.
Bygd 1975, stødd 120 $m^2$ + garasja 20 $m^2$. Húsini hava stoypta grund, yvirtromin timbur, klødd við rotfríum timbri, takið er eternit. Størsti partur av kjallarinum er krúpikjallari við stoyptum betonggólvi.
Eystursíðan er útgrivin til eitt arbeiðsrúm og fýrrúm.
Veghæddin: durur, wc, gong, køkur, grovkøkur/vaskirúm, stova, millumgong, baðirúm, hjúnarúm, og 3 kømur.
Frá stovuni er hurð út á altan/terassu og beinleiðis út í garðin.
Húsini eru sera væl hildin,hugnaligur urtagarður við runnum. Húsini liggja væl fyri, útsýni oman yvir Havnina, skjótt til gongu oman í miðbýðin.
Tætt við skúlar og dagstovnar.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Randarhús við bilhúsi til sølu

**Millum Gilja 13,matr. nr. 1my**, grundøki 200 m2.
Stór randarhús í besta standi, bygd 1989,krúpikjallari, tvær hæddir + loft, alt innrættað, íalt uml.145 m2 .
Stoypta grund, klædningur rotfrítt træ, takið eternitt, brandmúrur til báar síðir.
**Veghæddin:** gong, vaskirúm, wc, trappa upp til miðhædd, køkur og stova,frá stovuni hurð út á terassu.
**Miðhæddin:** gong, hjúnarúm, klædnarúm, tey kømur og baðiverðilsi við brúsu. Á loftinum er hugnalig stova og kamar.
Í bilhúsinum er innrættað arbeiðsrúm.
Húsini eru nýístangjørd og fingið nýggjan útbygning í stovuni, málaði bæði innan- og uttandura. Øll vestursíðan nýggj, eisini vindeyguni. Flisar í duri og vaskirúminum, nýtt vakurt furugólv í restini á miðhæddini.
Gott útsýni í allar ættir. Skjótt til dagstovn og gott bussamband.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Sethús til sølu

**Varðagøta 59, matr.788b,** Grundøki uml. 430m2
Stór góð sethús við tilbygningi, sum er innrættaður til skrivstovuhølir.
Sethúsini eru í tveimum hæddum við loft og kvisti. Upprunaliga bygd 1957, umbygd og høvuðsumvæld 1983. Miðhæddin er uml. 104 m2, loftshæddin uml.90 m2, kjallari uml. 16 m2 , goymslurúm uml.16 m2 restin krúpikjallari, tilbygningurin 98 m2
Húsini hava stoypta grund, tilbygningurin eisini stoyptur upp, klædningurin rotfrítt timbur, vindeyguni træ. Tekjurnar eru ávikavíst, stáltak og protan.
**Kjallarahæddin:** fýr-/vaskirúm og trappa til miðhædd. Miðhæddin: gong, sjónvarpstova, stova, køkur, kamar, baðirúm, trappa til loftshædd. Loft: gong, hjúnarrúm við altan, 3 kømur og wc. Tilbygningur: gong, 3 skrivstovuhølir, baðirúm og 2 goymslurúm. Giring er kring húsini og runnar eru í garðinum. Húsini liggja sera veðurgott, gott útsýni eystureftir og suðureftir, góð parkeringsviðurskifti,
stutt oman í viðarlundina og miðbýin.Tætt við dagstovn, skúla og Gundadal.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Sethús til sølu

**Velbastaðvegur 42, matr. nr.993p,Tórshavn.**
Grundøki uml. 472 m2.
Stór góð sethús við garasju og íbúð í kjallarinum. Byggiár 1971. Húsini eru í trimum hæddum við kvisti, allar hæddir innrættaðar.
Grundin er lagað upp við betongsteinum, yvirtromin er klødd við rotfríum timbri. Takið er alminium. Miðhædd og kjallarahæddin uml.96 m2 hvør hæddin + loft sum er umleið 75 m2 .
**Miðhæddin:** Hjallur, durur, gong við trappa upp til loft, baðirúm, køkur, matstova, stova, og hurð frá stovuni út á stóra altan.
Loftshæddin: gong, wc, klædnarúm, hjúnarúm og trý kømur.
**Kjallarahæddin:** garasja, fýrúm/vaskirúm, arbeiðsrúm, gong, trappa til miðhædd, køkur/stova og kamar, egin inngongd til íbúðina.
Húsini eru sera ljós, rúmlig og í góðum standi, nýmálaði bæði uttandura og innandura. Giring er kring húsini, urtagarður við runnum. Skjótt er til gongu heim í miðbýin, gott útsýni í allar ættir.
Tætt við skúla og dagstovn.
***Ognin verður seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Sethús við bilhúsi

**Birnugøta 33. Matr. nr.1470ag,** grundøki 701 m2
Stór sethús við tveimum kvistum, íbúð á loftinum og stórt leystandandi bilhús. Húsini eru í góðum standi, liðug bygd 2002, eru í tveimum hæddum, veghæddin uml. 120m2 , loft uml.95 m2. bilhúsið 35 m2
Húsini eru stoypt upp til skjøldur. Skjøldrar, timburkonstruktion klædningurin er rotfrítt timbur,takið er alminium.
**Veghædd**:gong,køkur,stova, baðirúm við baðikari og brúsu, hjúnarkamar, fýrrúm/vaskirúm og trappa upp til loft.
**Loft:** 3 kømur,stova/gong/køkur, baðirúm.
Húsini liggja sera frítt fyri við góðum útsýni í allar ættir, oman í býin, út á Nólsoyarfjørð og Glyvursnes.
**Príuppskot kr. 3.195.000,-**
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Sethús við garasju til sølu

**Fossagøta 6, Matr. nr. 667**, grundøkið íalt 736 m2.
Húsini eru bygd uml.1990 í tveimum hæddum, uml. 110 m2.hvør hæddin. Stoypt grund, yvirtromin timbur,klødd við rotfríum træ. Ì garasjuni eru allir veggir og loft stoypt.
**Stovuhæddin:** gong, trappa til kjallara, køkur, stór stova, baðirúm við flísagólvi og varma, hjúnarúm og 2 kømur.
Frá hjúnarúminum er hurð út á altan.
**Kjallarahæddin:** Garasja, fýrrúm, kjallararúm og eitt stórt sjónvarpsrúm, klárt er gjørt til baðirúm.
Húsini liggja frítt við góðum og vøkrum útsýni út á Skálafjørðin og suðureftir móti Nólsoynni.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Sethús við garasju til sølu

**Mýruvegur 21, Matr.nr. 26e,** grundøki 736 m2.
Hús í tveimum hæddum við garasju og hjalli, veghædd og loft, alt innrættað, veghædd uml. 100 m2 , loftshædd uml.70 m2 + garasja 40 m2 og hjallur 8 m2.
bygd umleið 1987. Húsini eru stoypt upp, skjøldurin træ, tekja er alminium nýggj frá 2006.
**Veghæddin:** durur, gong, hjúnarúm, kamar,wc við brúsu, stova trappa til loftshædd, køkur og vaskirúm/kjallari.
**Loftshædd:** gong, stór stova, trý kømur, wc/baðirúm við baðikari.
Hiti er í gólvum har flísae eru, so sum baðirúm, durur og vaski/kjallararúm.
Húsini liggja sera frítt, gott útsýni, mitt í bygdini, tætt við skúla, dagstovn, handil, banka og gott bussamband.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## 2 eigaraíbúðir til sølu

**J.C.Svaboesgøta 19, matr.nr. 963c,** grundøki 204$m^2$.
Talan er um 2 sjálvstøðuar íbúðir sum verða seldar hvør sær ella saman. Nýbygdar ár 2000. Hvør íbúðin hevur hvør sína hædd, kjallarahædd og 1.hædd, hvør uml. 70 m2
**Stovuhæddini :** Gong, køkur, stova,kamar,hjúnarrúm og baðirúm við brúsu.
**Kjallarahæddin:** Gong, Stova/køkur,hjúnarúm, kamur, baðirúm við brúsu.Íbúðinar eru í sera góðum standi bæði uttan og innan. Kjallarahæddin stoypt upp, klædningurin er rotfrítt træ, vindeyguni eru mahogny, innan eru allir veggir klæddir við fiburgips eisini millum íbúðirnar. Brandmúrur er til grannahúsini. Íbúðirnar liggja sera væl fyri mitt í Havnini, skjótt til handil og til gongu heim í miðbýðin.
***Verða seldar um nøktandi verður givið!***



## Sethús til sølu

**Hoyvíksvegur 14, Matr.nr. 533,** grundøki 328 m2.
Húsini eru í trimum hæddum kjallari, miðhædd og loft við trimpul, allar hæddirnar innrættaðar, hvør hæddin uml. 47 m2 +útbygningur 3 m2
Upprunaliga bygd umleið 1930. Klædningur og tekja galv. jarn. Innandura er nógv gjørt við húsini, vindeyguni eru træ skift ár 2000.
**Kjallarahæddin:** Trappirúm við trappu til miðhædd, gong, wc, brúsirúm, kamar, goymslurúm og fýrrúm.
Miðhædd: durur, gong, trappa til loft, køkur og stór stova.
**Loftshædd:** Gong, hjúnarúm, tvey kømur baðirúm við baðikar og vaskimaskinu
Húsini liggja mitt í býnum, lýtt og góður sólagangur í garðinum, flisar lagdir á túnið kring húsini
10. min. til gongu oman á vaglið,
tætt við skúla og dagstovn.
***Verða seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Vinnubygningur til sølu

**Vágsbotnur 14, Matr.190,** grundøki 53 m2.
Bygningurin er upprunaliga bygdur 1934, í trimum hæddum, hvør hæddin uml. 50 m2, alt innrættað.
Stór altan útfrá miðhæddini.
Høvuðsumvældur í 1983. Betongvegir við bjálving og "steniplátum". Niðasta hæddin er innrættað til hárfríðkunarstovu, báðar tær ovastu hæddirnar verða nýttar til skrivstovuhølir. Tvey leigumál eru í ognini.
Bygningurin liggur sera hugnaligt og væl fyri niðri í Vágsbotni, góð parkeringsviðurskiftir og útsýni gott, yvir Vestari vág og Skálatrøð
Ein perla mitt í býnum.
***Ognin verður seld, um nøktandi boð verður givið!***



## Grundøkið mitt í býnum til sølu

**J.Nolsøesgøta, matr. 899 ag,** grundøki 836 m2.
Stórt grundøki, sum vøkkult fæst nærri miðbýnum, 15. min.til gongu heim á "Glade hjørn", stykkið er slætt, soleiðis at ikki er neyðugt við umfatandi spreinging fyri at gera stykkið byggiklárt, liggur friðarligt og veðurgott, við góðum parkeringsmøguleikum, ongin gjøgnumkoyring, tætt við skúla og dagstovn.
***Verður selt, um nøktandi boð verður givið!***

SETHÚSASØLAN

Tórsgøta 13 · boks 3156 · FO-110 Tórshavn
Tel 210252 / 320252 · fax 320260
sethusasolan@sethusasolan.fo
www.sethusasolan.fo